VIÐMERKINGAR

## Ráðharrar í tvístøðu

**Hergeir Nielsen**



Stórur dentur verður í hesum døgum lagdur á at fáa so virðilig viðurskifti sum gjørligt millum Føroyar og Danmark.

Formansskapir og stjórnarleiðarar hava hitt hvønnannan í summar, og avtalur eru gjørdar á hægsta stigi.

Nú vit nærkast ólavsøkuni tykist kortini eitt og annað taka seg upp, sum er heldur óheppið fyri víðari gongdina rætta vegin.

Okkum varð lovað egnan myndugleika í egnum uttanríkis- og verjumálum, men hesi lyftir eru nú sópað til viks. Hesi mál eru nú aftur ríkismál - "sådan er det."

Eitt samt løgting hevur samtykt, at hernaðarlógir ikki skulu kroystast niður yvir okkum, men lítið dugir. Her eru tað vit, ið ráða, siga danir, og teir gera um teimum lystir.

Vit hava fingið mótstríðandi upplýsingar frá fleiri donskum ráðharrum um fíggjarligu viðurskifti okkara við NATO-felagsskapin.

Fleiri ráðharrar siga danir hava spart risaupphæddir upp á Føroyar og Grønland, meðan aðrir siga, at vit meir at kalla bara hava verið til útlegg.

Óheftir sakkønir í Føroyum og Grønlandi hava roknað seg fram til fleiri 10- tals milliardir, sum danir hava spart, meðan danski verjumálaráðharrin nú sigur, at vit kosta teimum 144 milliónir krónur í árligum verjuútreiðslum.

"Nær hevur Danmark vart Føroyar hernaðarliga, tá á hevur staðið?" spurdi Janus Kamban, eldri, forsætismálaráðharran, tá hann var her, men fekk einki svar.

Ferð eftir ferð hava danir víst hesum máli frá sær, og ikki vilja viðgjørt tað, men nú fyriliggur ein nýggj støða.

Sitandi forsætis- og sitandi verjumálaráðharri hava við ein munn sagt eini fólkatingsnevnd, at Føroyar og Grønland einki positivt íkast geva til danska búskapin, meðan undanfarnir ráðharrar í somu sessum søgdu tað øvugta.

Danska fólkatingið tolir ikki, at ráðharrar siga ósatt, og her sigur onkur ósatt.

Samskiftið okkara við danir tolir illa hesa tvístøðu teirra framyvir, og vit eiga at fáa greiðu á hesum máli.

Í beinleiðis samráðingum partanna millum vísa danir uppgerðini frá sær, men aðrar leiðir eru nú gongdar.

Fólkatingsumboð okkara eiga sjálvandi at nýta hetta gylta høvið til at fáa greiðu á, hvør ið sigur satt, og hvussu fíggjarligu viðurskifti okkara í NATO-felagsskapinum hanga saman.

# Skipað parkeringsviðurskifti á flogvøllinum

**Nú verða skipað parkeringsviðurskifti við flogvøllin – har tú mótvegis gjaldi kanst langtíðarparkera**

PARKERING
*Eirikur Lindenskov*

Umsíðir verða skipað parkeringsviðurskiftið kring flogvøllin í Vágum.

Herfyri greiddi Sosialurin frá, at avtala varð gjørd millum Vága Vaktarhald og Landsverkfrøðingin um parkeringina. Hetta samstarvið er nú formliga er farið at virka.

Frá mánadegnum farna at rokna ber til at seta bilin frá sær móti gjaldi á langtíðarparkeingsøkinum, har vaktarfólk ansar bilunum alt samdøgrið.

Frá komandi mánadegi at rokna verða eisini broytingar gjørdar á parkeringsøkinum framman fyri komuhøllina, har áður loyvt hevur verið at parkera í 24 tímar. Nú ber einans til at parkera har í tveir tímar.




VIÐMERKINGAR

## Frítt fram fyri pedofili á føroyskum ungdómssíðum?

**Búi Tyril**

Datt fram á pop.fo tann 14. juli og fekk eitt sjokk tá eg las eitt sindur í einum av kjaktráðunum har. Har var ein persónur í gongd við at spreiða pedofilt eitur! Man spyr seg sjálvan, hvør er tann ritstjórnarliga kósin á hesum tíðindamiðli fyri føroyskan ungdóm?

Ikki fyrr enn ein kendur maður persónliga hevði vent sær til leiðsluna á pop.fo við áheitan um at taka innslagið burtur, var hesin skammiligi tankatoskur tikin av aftur heimasíðuni. Men tá hevði hann eisini staðið alment uppi til øll at lesa í tveir dagar, til skaða fyri ikki bert exponeraðar lesarar men beinleiðis til óbótaliga sorg og tort fyri foreldur og familju annars hjá einari 4 ára gamlari smágentu hvørs einasta mistak var at smíla til fotografin.

Tíbetur varð tilburðurin meldaður til Kriminalpolitiið. Eftir stendur tó framvegis ein ringur deymur av einum sjúkligum mentaliteti sum eftir øllum at døma trívist á hesum oyggjum.

Vónandi verða tey ið høvdu ábyrgdina av innlegginum drigin til svars, um ikki annað so innanhýsis av teimum ið hava evstu ábyrgdina av heimasíðuni. Tað kann á ongan hátt vera nóg mikið við einum "oyss umskylda, eg meinti tað ikki, hatta var bara skemt," sum annars høvundin av tí sjúka innlegginum royndi at koma við tá ið pápin at smágentuni ið hevði verið fyri áganginum talaði at, tá ið skaðin longu var hendur. Tað kundi verið áhugavert at vita hvat Føroya Tele sigur til tílíkt...

## Afrikanskar rútmur runga á G Festivalinum í Gøtu

**Á G-festivalinum hesaferð verður forkunnug vitjan úr Gambia. Talan er um teir báðar Basiru Njai og Dankun Travelly, ið spæla ymsar afrikanskar trummur**

FESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

Teir báðir fara ikki á pallin at framføra, men heldur at vera millum festivalgestirnar á økinum og seta dám á við afro-rútmum úr heimlandinum Gambia. Hetta er fyri at geva festivalinum nakað eyka av sjáldsemi, fjølbroytni og hugna.

Har sum Basiru og Dankun eru føddir og uppvaksnir, er tað at spæla trummur frá barnsbeini av eins náttúrligt, sum tað at eta ræstan fisk er her í Føroyum.

Í løtuni búgva teir báðir í Danmark, har teir spæla við fleiri bólkum umframt at undirvísa í afrikansum trummum.

Umframt verða undirhildin við afro-trummum kanst tú eisini fáa nakað heilt serligt burturúr. Basiru og Dankun fara nevniliga at hava workshop og undirvísing í afrikanskum trummum fyri áhugaðum á G! festivalinum. Áhugað kunna tekna seg ella spyrja seg fyri á:

booking@gfestival.com



MÓTTØKA AV ULL

Í samband við, at ullamóttøkur eru settar á stovn, skal vera sagt frá, at tikið verður ímóti ull soleiðis:

**Frá mikudegnum 16. juli 2003 kl. 09.00**

**á Tøting í gøtu tlf. 44 10 20**
**hjá Sirri í vági tlf. 37 40 06**

Fyri ull, ið er turr og væl hagreidd, verður latið kr. 4,- fyri kilo sum stuðulsískoytið.

Tann parturin av ullini, sum ikki kann gagnnýtast, skal vera skildur frá og beindur burtur á staðnum ella á rættini á forsvarligan hátt.

Gjørt verður tí vart við, at ullamóttøkan skilar sær rætt til at geva lægri ella ongan prís fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s. ull við skarni, sandi, mosa o.ø. í.

Flutningsstuðul á kr. 2,00 pr. kilo verður latin til innlatarar, sum ikki búgva í Streymoy, Eysturoy ella Suðuroy.

Alm. Royndir og ráðgeving
Royndarstøðin
FO-410 Kollafjørður

Sosialurin 341800

ULLAMÓTTØKA

Ullaprísir frá Sirri í Vági

Vit lata kr. 10,- fyri kilo íroknað stuðulsískoyti og lata Sirri vørur í býti.

Vit taka ímóti ull úr øllum landinum og ullamóttøkan hevur opið:
Gerandisdagar kl. 10 - 17

Tel 374 006 - 222 678

Sirri
FØROYSK ULLVØRA
Tlf. 374006 · Fax 374106

Sosialurin 341800

Summarfrí

21. juli - 8. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 21. juli til fríggjadagin 8. august, báðir dagar íroknaðir.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10:00 – 12:00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við ALS um telefax ella teldupost.

Útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli fyri skeið 14 og 15 verður avgreitt sum vanligt.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel [illegible] • Fax [illegible] • [illegible] • [illegible]

Móttøka av ull

Vita taka ímóti ull:

**Frá mikudegnum 16. juli 2003**
**og fram til ólavssøku.**

Ullin skal vera turr og væl hagreidd, og fyri hetta lata vit:

kr. 6,- pr. kilo íroknað stuðul til eigarar í Eysturoy og Streymoy, og
kr. 8,- pr. kilo íroknað stuðul og ferðastuðul til hini plássini.

Gjørt verður tí vart við, at lægri ella ongin prísur verður latin fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s. ull við væl av skarni, sandi, mosa o.ø. í.

Um avtala er gjørd frammundan, er gjørligt at koma við ullini eftir vanliga arbeiðstíð.

Töting

Tel 44 10 20 og 21 20 91 · FO-510 Gøta

Sosialurin 341800

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 21. juli til og við 15. august 2003.

**Vága Sjúkrakassi**
360 Sandavágur
Tlf. 333031 · Fax 333145